**Álit**

**í**

**løgtingsmáli nr. 46/2025: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjófeingi (Sjófeingislógin)** (Flyting av fiskidøgum til árið eftir verður víðkað til eisini at fevna um bólk 5)

Jóhannis Joensen, Bárður á Steig Nielsen, Jacob Vestergaard og Árni M. Dam, tinglimir, hava lagt málið fram 11. november 2025, og eftir 1. viðgerð tann 13. november 2025 er tað beint Vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 19. november 2025.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

**Meirilutin** (Erhard Joensen, Eyðdis Hartmann Niclasen, Árni Skaale, Jørgen Niclasen og Árni M. Dam) hevur hesar viðmerkingar:

Endamálið við uppskotinum er at tryggja, at allir loyvishavarar – bæði einstaklingar og feløg – verða stillaðir líka.

Í § 19, stk. 4 í Sjófeingislógini frá 2019 verður heimild latin landsstýrismanninum at áseta reglur um, at fiskidagar, sum hvør bólkur sambært § 18, stk. 1, nr. 1-4 ikki hevur brúkt í fiskiárinum, kunnu flytast til árið eftir, og verða tillutaðir sum felags fiskidagar fyri hvønn bólkin at brúka í tíðarskeiðinum frá 1. oktober til 31. desember, undir hesum treytir fyri at fáa lut í hesum fiskidøgum.

Bólkur 5 er samansettur av tveimum bólkum, bólki 5 A, sum eru fullriknir útróðrarbátar undir 15 tons og bólkur 5 B, sum eru ikki fullriknir útróðrarbátar undir 15 tons.

Hví bólkur 5 upprunaliga ikki varð tikin við í § 19, stk. 4, tá lógin varð samtykt í 2019, er ilt at siga, men hugsast kann, at man tá ikki metti, at hetta fór at gerast ein trupulleiki fyri bólkin.

Nú vísir tað seg tó, at hetta fyri 2025 er ein trupulleiki, við tað at dagarnir hjá bólki 5 B vóru uppi 16. oktober í ár.

Hendan støðan var ikki íkomin, um so var, at bólkur 5 eisini varð umfataður av § 19, stk 4 í Sjófeingislógini.

Hetta heldur meirilutin vera skeivt og ynskir tí við uppskotinum at rætta hendan feilin.

Velur landsstýrismaðurin at flyta dagar til árið eftir, verður talan um ein buffara til bólk 5 samlað sæð. Í bólki 5 eru tveir bólkar, A og B, og tað verður tí tann bólkur, sum hevur fiskað sínar dagar upp, sum hevur rætt til teir dagar, sum verða fluttir yvirum ár.

Við hesum viðmerkingum tekur meirilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Minnilutin** (Annika Olsen og Uni Holm Johannesen) hevur hesar viðmerkingar:

Í Føroyum skal umsitingarætlanin vera karmur um fyrisitingina av fiskidagaskipanini, so fiskastovnarnir verða gagnnýttir lívfrøðiliga og búskaparliga burðardygt. Tað eru vinnan, manningarfeløgini, Havstovan og politiska skipanin samd um. Hendan sama umsitingarætlanin og trúvirði hennara er eisini umráðandi fyri atgongd og prís á okkara fiski og fiskavørum, tí fiskakeyparar í breiðum høpi vilja hava vissu fyri, at fiskur og fiskavørur stava frá burðardyggum fiskiskapi, sum er ein treyt fyri góðkenningum sum Marine Stewardship Council (MSC).

Minnilutin heldur tað ikki vera rættur arbeiðsháttur at samtykkja eitt lógaruppskot sum hetta, ið ikki er grundfest millum teirra, sum sita fyri og virka eftir umsitingarætlanini. Minnilutin heldur, at hetta arbeiðið eigur at verða tikið upp í einum størri høpi og hevur av tí sama fyrr, í uppskoti til samtyktar, heitt á landsstýrismannin um at arbeiða við einum leisti, sum fer at javnseta bólk 5 við hinar bólkarnar í fiskidagaskipanini, so ein ávísur partur av óbrúktum døgum kann flytast tvørtur um ár.

Landsstýrismaðurin hevur eisini boðað frá, at øll skipanin við óbrúktum døgum skal endurskoðast, m.a. tí ongar avmarkingar eru fyri, hvussu nógvir óbrúktir dagar kunnu verða fluttir yvir um ár.

Við hesum viðmerkingum tekur minnilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

**Vinnunevndin, 28. november 2025**

| | | |
|---|---|---|
| Erhard Joensen<br>formaður | Annika Olsen<br>næstforkvinna | Eyðdis Hartmann Niclasen |
| Jørgen Niclasen | Árni Skaale | Uni Holm Johannesen |
| | Árni M. Dam | |